## Verður helst dýrt

Tað er einki at ivast í,a t Angelos Anastasiadis kann rokna við, at dysturin á Svangaskarði fær eitt eftirspæl fyri hansara viðkomandi.

Tá kypriotiski venjarin varð burturvístur av vøllinum, snøgt sagt noktaði hann at fara, og í glósum, sum ikki kundu misskiljast, gjørdi hann vart við sína ónøgd um avgerðina.

Frágreiðing er skrivað og send FIFA. Men hóast úrskurðurin um málið ikki verður gjørdur enn, so vita keldur at siga okkum, at talan helst verður um bæði leikbann og bót til kypriotiska venjaran.

-jm

## Liktenstein skapti sensatiónina

Umframt dystin á Svangaskarði vórðu fimm aðrir dystir í HM-undankappingini spældir mikukvøldið.

Mest óvæntaða úrslitið í hesum var uttan iva, at Liktenstein á heimavølli stríddi seg til málleysan javnleik móti Slovakia. Eisini Andorra fekk eitt heiðurligt úrslit, tá teir megnaðu at avmarka tapið móti Rumenia til 2-0, meðan Letland á heimavølli vann frálíkan 1-1 javnleik móti Russlandi.

Einasta Norðanlandi, sum spældi teljandi dyst hetta kvøldið, var Finnland, sum á útivølli vann greiðan 3-0 sigur á Makedonia.

Úrslitini mikukvøldið vóru annars hesi:

Føroyar-Kypros 0-3

Kasahkstan-Georgia 1-2

Letland-Russland 1-1

Makedonia-Finnland 0-3

Liktenstein-Slovakia 0-0

Rumenia-Andorra 2-0

-jm

# Úrslitið var tað ringasta

Hóast úrslitið var helst stóra vónbrotið hjá føroyskum fótbólti, síðani landsliðið í 1993 tapti 2-0 fyri Kypros, so helt føroyski venjarin, at tað eisini vóru positivir lutir at síggja í avrikinum.

– Tú hevur nokk rætt í, at úrslitið nokk var tann vánaligasti parturin av dystinum fyri okkara viðkomandi.

– Vit hava jú fleiri møguleikar, men hinvegin, so eru teir eins góðir, sum vit høvdu roknað við. Og teir skapa sær eisini nakrar møguleikar, men teir fáa so trý mál burtur hesum, og tað var so tann stóri munurin á liðunum.



*Henrik Larsen helt,at føroyska liðið átti betri uppiborið í dystinum. Ikki minst, tí liðið hóast alt skapti fleiri opna møguleikar, sum tó allir vórðu misnýttir*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Góðskan ov lítil

Ein tann størsti trupulleikin hjá føroyska liðnum tóktist vera, at góðskan í bæði uppspæli og innleggum ikki var nóg góð. Nakað sum landsliðsvenjarin á ongan hátt var ósamdur í.

– Uppspælið úr aftastu ketuni var ikki nóg gott, og tí fingu vit ikki lagt nóg nógv trýst á. Tá vit so hóast alt komu um kantarnar nakrar ferðir, so vóru innleggini bara ikki nóg góð. Tey lógu at kalla konsekvent á fyrsta kypriotiska verjuspælaran, og tað er altso ikki nóg gott. Og endaliga, so fáa vit kortini nakrar stórar møguleikar burturúr, men hesar megna vit ikki at gera okkum dælt av. Tað var, sum vóru teir alla tíðina eitt lítið fet skjótari enn okkara, og tað var kanska tann størsti munurin í dystinum. Teir hava altso fleiri spælarar, sum spæla í bestu griksku deildini, og tað gevur so meira, enn um spælarar spæla í bestu føroysku deildini og í donskum fótbólti.

– Tá tað er sagt, so haldi eg kortini, at vit áttu betri uppiborið. Hóast vit ikki spæla upp til okkara allarbesta, so skapa vit fleiri møguleikar. Og hóast vit missa bæði Súna og Toda, so hava vit fyri tað allar mesta eitt sera gott tak á dystinum. Og hugsar tú samtundis um, at vit hvørki hava Fróða Benjaminsen ella Julian Johnsson við í dag, so er tað klárt, at talan verður um mótbrekku.

### Hevði álit á Mortani

Tá tosað verður um fráveruna, so er væl eisini náttúrligt at tosa um teir, sum loystu av. Her munnu tey flestu vera samd um, at Mortan úr Hørg var mest positiva føroyska innslagið.

– Tað er einki dulsmál, at eg var sera væl nøgdur við Mortan. Hann megnar at koma, og er sera dugnaligur, tá trýst skal setast á teirra verju. Tað høvdu vit eisini roknað við út frá tí, sum vit høvdu sæð undir venjingunum. Nú hava vit so eisini sæð, hvat hann er førur fyri í einum slíkum dysti, og tað er avgjørt positivt, staðfestir venjarin.

Hóast úrslitið soleiðis var eitt av teimum heilt keðiligu, so tóktist Henrik ikki at halda, at nøkur orsøk var at dvølja ov leingi við keðiligu síðurnar av dystinum.

– Har var jú hóast alt eisini nógv positivt at síggja. Vit hava dyst móti Fraklandi um hálva triðju viku, og tá hava vit bæði Jákup og Fróða við aftur. Tað gevur eina góða kapping um plássini, og so mugu vit bara royna at standa okkum so væl sum gjørligt í Fraklandi, heldur Henrik Larsen at enda.

# Zidane er klárur

**Tjóðarhetjan skeyt eitt av málunum, tá Frakland hitaði upp til Føroya-dystin við einum tryggum 3-0 sigri á Fílabeinsstrondini**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

»Takk fyri Zidane« og »Zizou – leið okkum til HM« vóru millum skeltini, sum vóru at síggja kring vøllin, tá Frakland mikukvøldið spældi venjingardyst móti Fílabeinsstrondini.

Hóast liðið hesaferð eisini gav come-back til Liliam Thuram og Claude Makelele, so var tað Zinedine Zidane, sum tað mesta snúi seg um. Gávaði spælarin, sum av fleiri verður roknaður á hædd við Pelé og Maradona í alheims fótbóltssøgu, hevur aftur játtað at vera partur av franska landsliðnum, og hóast hann ikki dominneraði dystin, so slapp hann at seta sítt týðilig merki á kortini. Ikki minst, tá hann í seinna hálvleiki økti til 2-0. Hini bæði fronskuk málini skutu William Gallas og Thierry Henry.



*Zinedine Zidane er aftur. Fronsku áskoðararnir vilja í øllum førum vera við, at Frakland nú aftur skal teljast millum tær allar sterkastu fótbóltstjóðirnar í heiminnum. So er spurningurin, hvat føroyska landsliðið megnar um góðar tvær vikur*

### Danir í hopla

Donsklu miðlarnir fingu ovmikið at frøast um, tá tað í Parkini eydnaðist dønum at senda enska landsliðið heim við størsta tapinum í 25 ár.

4-1 gjørdist úrslitið í dystinum, men í Onglandi varð ikki tosað um, hvussu góðir danir vóru. Heldur varð fokus sett á eina katastrofala enska byrjan til seinna hálvleik, har danir – væl hjálptir av David James – at kalla avgjørdu dystin innan fáar minuttir.

Aðrastaðni spældu Týskland og Holland javnleik í einum undirhaldandi dysti. Noreg mátti taka til takkar við einum 2-0 tapi fyri Sveis, har tann í Føroyum so væl kendi Alexander Frei skeyt eitt av sveisisku málunum.

Og loksins so eydnaðist eisini Svøríki at fáa eitt gott úrslit. Sviar tóku á heimavølli móti Kekkia, og her tryggjaðu Henrik Larsson og Markus Rosenberg grannum okkara ein 2-1 sigur móti sterku kekkunum.